Onki verður sum fyrr aftaná

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD
rithøvundur

Norðoyingar og føroyingar annars heilsa í dag tunnlinum undir Leirvíksfjørð væl komnan og samstundis siga klaksvíkingar gomlu bygdini, sum teir plaga at taka til, farvæl. Klaksvíkin, sum teir hava kent hana, fer í søguna, og ein heilt nýggjur lokalur høvuðsstaður fer at trýna fram á pallin fyri norðoyingar. Hvussu framtíðarlagnan verður hjá Klaksvík veit eg ikki, eitt veit eg, tað verður ongantíð aftur sum fyrr. Henda stóra bygd, tað eru klaksvíkingar enn, sum ikki dáma býarheitið, hevur livað og ment seg avbyrgd og hevur trivist væl, sum ein fjarskotin partur av landinum. Tað hevur verið eitt eyðkenni fyri samleikan hjá klaksvíkingum, júst tað, at teir hava verið avbyrgdir og ikki ein partur av landinum og serliga ikki ein partur av teimum suðuri í Havn.

Onki verður sum tað hevur verið, nú koyrandi er undir Leirvíksfjørð. Klaksvíkin skal finna nýtt stev og hvussu hetta stevið verður, er ógvuliga ilt at spáa um.

Nú spyr lesarin kanska, hvussu ein 48 ára gamal rithøvundur og journalistur kann siga, at alt verður broytt í Klaksvík, og at klaksvíkingar, um teir vilja tað ella ikki, ikki longur sleppa at vera so avbera lokalir og væl vardir aftanfyri Klakk og Háfjall. Eg tosi av royndum og forsøgan er henda.

Ein heystardag í 1968, nærri roknað tann 23. meðan meðan ungdómsuppreisturin herjaði heimin, og alt skuldi broytast, koyrdi ein fremmandur bilur heim um Garðamørk í Oyndarfirði. Honum elti ein bilrød so langt eygað røkk. Oyndarfjørður hevði fingið vegasamband og alt var í einum gleðisrúsi. Ongin grunaði, at henda hending fór at hava so kollveltandi broytingar við sær fyri lítla bygdarsamfelagið. Tað var ikki fyrr enn ár aftan á, at oyndfiringar raknaðu við og sóu, at teirra heimbygd var ikki at kenna aftur. Hvussu hátiðarhaldið var kundi verið skrivað ein heil bók um. Veislan fekk ikki annað navn enn Vegballið og var nógv havd á munni tey næstu tíggju árini. Oyndfirðingar bjóðaðu gestunum ræst kjøt, sum varð kókað niðri í kjallaranum í sethúsunum hjá Gamla Høgnesen í Víkum og notið afturvið snapsi og elefantøli í fínu stovunum upp á og enntá í roykstovuni uppi á loft. Har var ball og kenning og eg var 11 ára gamal og fekk saman við javnaldrum mínum nápað onkra stubbafløsku við elefantøli, sum ikki smakkaði so væl, sum hon kom at gera seinni. Har var reyp, har var ball, har var fyllskapur, bardagi, dansur og gott lag og nógv fremmandafólk.

Tað rann av aftur og oyndfirðingar bjóðaðu framtíðini av við góðum treysti, nú var vegasambandið komið og nú var einki óført. Avbyrgingin var av. Fólk kundu fara av bygd, tá ið tað passaði teimum og einki stríð var í mun til fyrr. Handilsmaðurin í Oyndarfirði og skyldmaður mín, Eivind Petersen, fortaldi mær í vikuni, at tað vanliga tók honum tríggjar dagar at avgreiða jólainnkeypið til handilin í heilsølunum í Havn. Nú kunnu oyndfirðingar gera eini ørindi í Havn og ikki vera meira enn tríggjar tímar burtur heiman.

Nú eru tveir dagar eftir til tøppurin verður tikin úr Norðoyartunnlinum og spurningurin er hvønn veg frárenslið fer at renna. Fer tað at renna í Norðoyggjar ella fer tað at renna inn á meginøkið.

Evstamarkið á Sosialinum rak meg úr koyggjuni her á Hellunum klokkan fimm í morgun. Sólin skínur, tað er ikki eitt skýggj á himmalinum, lotið er kalt og kavarfannirnar á Sandfelli gráta ikki í morgun um sítt hvíta lín. Sólin munar ikki so høgt upp enn. Eg síggi heim í heimbygdina og telji húsini, sum eru bygd aftan á at vegurin kom til bíggjar í 1968. 29 hús eru bygd í hesum tíðarskeiði og tað er ikki so galið fyri eina bygd upp á knappliga 200 folk. So telji eg tey tómu húsini, og tey oyðileggja hetta roknistykki, tey eru 19 í tali. Tað merkir eitt húsayvirskot upp á 10 hús seinastu 38 árini. 76 sethús eru tilsamans í Oyndarfirði. Trekka vit tey 19 tómu frá, so eru vit niðri á 57 húsum. Trekka vit tey 29 nýggju húsini frá, har enn búgva familjur við børnum, tá eru 28 hús eftir. Í teimum búgva eitt og tvey fólk og tey flestu av hesum eru eldri fólk, eldri fólk, har børnini eru flogin, ella gamlir drongir og gamlar gentur.

Eg veit ikki um menningin í Oyndarfirði ræðir klaksvíkingar, tað átti hon at gjørt, og teir kunnu vera vísir í, at standa teir ikki framhaldandi fyri egnari menning, so syrgir meginøkið fyri at júst tað sama hendir i Klaksvík, sum hent er í Oyndarfirði seinastu 38 árini.

Áðrenn eg fari at viðgera teir møguleikar tunnilin kann geva klaksvíkingum skal eg neima eitt sindur við vinnuligu menningina í Oyndarfirði, hóast hon er í nógv minni mátistokki enn í Klaksvík. Tá ið eg var drongur í Oyndarfirði lógu tveir 20 tonsarar á sandgrynnuni og tríggir stórir maskinbátar. Teir róðu út og fóru norður um saman við fuglfirðingum, leirvíkingum og klaksvíkingum. Teir róðu umborð at seta í gongd, løgdu at keiini at taka stampar, hildu norður um komu aftur við stampunum og fóru síðan suður um Boðar til Haraldsen í Fuglafirði at avreiða. Síðan lá leiðin norður aftur til Oyndarfjarðar, fortøjaðu bátarnar, svóvu nakrar tímar og síðan avstað aftur. Ein ógvuliga tungur vinnuligur vegur. Nú skuldi ein hildið at vegasambandið fór at bøta upp á hetta. Tað gjørdi hann ikki. Fiskur varð ikki lagdur upp á land, nú hann kundi koyrast til eitt flakavirkið í nánd. Bátarnir sigldu framvegis suður um Boðar tey fyrstu árini og menning hendi ongin. Góð 10 ár seinni varð farið undir at gera eina havn, og tá vóru menn alvísir í, at nú fór bygdin at mennast. Havnin kom í 1982 og skjótt stóðu ikki færri enn trý virkir á havnalagnum. Øll hesi virkini hava ligið steinoyðin seinastu mongu árini. Okkurt hissini virksemi hevur verið, men tað hevur onga mettu givið. Í dag sær støðan soleiðis út. Har er einans ein bátur í drift, ein goggubátur, sum fiskar agn til aðrar og bestemt ikki til oyndfirðingar. Oyndfirðingar hava minst líka góðar møguleikar fyri útróðri sum klaksvíkingar, hóast tað, so liggur hendan flotta havnin, sum kann hýsa bátum í øllum veðri oyðin og deyð. Tað var nógv meira lív í, tá bátarnir lógu við teym á sandgrynnuni, hví er hetta soleiðis.

Eg veit ikki um næstu reglurnar ræða klaksvíkingar, tað áttu tær at gjørt. Oyndfirðingar fáa vegin í 1968 júst um tað mundið tá ið demokratiska vælevnið í USA, Robert Kennedy verður myrdur og somuleiðis mannarættindastríðsmaðurin Martin Luther King, og heimurin uttanfyri letir seg upp og heimurin letir seg upp fyri bygdini.. Teir ungu, sum skuldu tikið við eftir teimum eldru at søkja sjógvin hóma nýggjar møguleikar á meginøkinum. Á Skála stendur